


www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 08 - 2013

# Føroyar partur av milliarda oljuavtalu

Føroyar eru partur av eini avtalu, sum er gjørd millum norska oljufelagið Statoil og eysturríkska orkufelagið OMV, ið umfatar øki í Onglandi, Norra og Føroyum. Umframt sølu umfatar avtalan eisini størri samstarv millum feløgini, og har væntast kann enn tættari samstarv í Føroyum eisini. Bæði Statoil og OMV eru við í boringum á føroyska landgrunninum næsta ár. Flest allir oljuportalar Vesturheiminum umrøða avtaluna, har OMV nu av alvara leggur til brots a Atlantsmotinum. 16 mia. kr. Norska oljufelagið Statoil hevur gjørt avtalu við eysturríkska almenna oljufelagið OMV um at selja part av ognum sínum á norska landgrunninum og vestan fyri Hetland til eitt virði uppá 15,7 mia. kr. Talan er um part av oljukeldunum Gullfaks og Gudrun á norska landgrunninum, har Statoil sum fyristøðufelag minkar um sín ognarlut ávikavist úr 70 til 51% og úr 75 í 51%, umframt at lata frá sær ognarlutirnar í oljukeldunum Schiehallion og Rosebank, sum liggja á bretska landgrunninum stutt frá føroyska markinum. Statoil hevur havt 30% ognarlut av Rosebank og 5,88% av Schiehallion. Orsøkin til at Statoil hevur gjørt av at selja av sínum ognum er tann, at felagið savnar kapital fyri at gera íløgur í útbygging av nýggjum oljukeldum so sum Johan Sverdrup og Mariner. Í avtaluni fer Statoil eisini undir samstarv við OMV um leiting og menning av tøkni við øktari oljuframleiðslu fyri eygað bæði í Noregi, Bretlandi og í Føroyum. Sambært avtaluni fær OMV møguleika at taka upp samstarv við Statoil í 11 av tess leitiloyvum í Føroyum, vestan fyri Hetland og í Norra. Í dag samstarva Statoil og OMV í loyvi 008, har feløgini fara at bora ein brunn næsta ár. (Lesið eini greining á oljan.fo í næstum um, hvønn týdning nýggja avtalan kann fáa fyri føroyska oljuleiting.) Styrkja samstarv við OMV Statoil sær fram til at styrkja samarbeiðið við OMV á norska landgrunninum, har OMV longu er ein virdur partnari í keldunum Edvard Grieg og Aasta Hansteen. Henda avtala gevur

okkum møguliekar at menna samstarvið millum oljufeløgini, sigur Helge Lund, Statoil stjóri. Hetta er ein vinnarastøða fyri bæði Statoil og OMV. Umframt keypið av ognarpørtunum so eri eg sera errin av at fara undir eitt partnararskap við eitt av heimsins leiðandi feløgum innan offshoretøkni og øktari framleiðslu, sigur Gerhard Roiss, samtaksstjóri hjá OMV. Handilin, sum er gjørdur, er framhald av eini sølugongd, sum Statoil byrjaði fyri nøkrum áru síðani. Í vár gjørdi felagið avtalu við oljufelagið Centrica eisini um sølu av ognum á norska landgrunninum fyri tilsamans 9 mia. kr. Eisini hevur felagið gjørt avtalu við týska Wintershall um sølu av ognarpørtum í Brage, Gjøa og Vega og Edvard Grieg loyvunum fyri 8,2 mia. kr. Tvs. at seinastu mánaðirnar hevur Statoil selt út av ognum fyri góðar 33 mia. kr. Statoil hevur seinastu árini verið eitt av bestu leitifeløgunum í heiminum og hevur gjørt fleiri nýggj og stór olju- og gassfund bæði á norska landgrunninum og úti í heimi eisini, sigur Helge Lund, stjóri, sum leggur aftrat, at sølan av ognum ger felagiðført fyri at gera íløgur í sera lønandi framtíðar framleiðslur so sum Johan Sverdrup. Helge Lund sigur víðari, at hetta er ein skilagóð gongd fyri Statoil, sum higartil hevur megnað at fáa stóran vinning av sínum íløgum í eitt nú Norðsjónum, og sum nú tað hevur gjørt nýggj og stór fund hevur útvegað sær kapital til at útbyggja hesi. Statoil hevur annars eisini áður brúkt nógva orku uppá at fremja sína strategi í kjarnuøkjum við høgum váða og høgum vinningi við at selja eitt nú út av ognum so sum bensinstøðum og gassrørleiðingum og øðrum, sum felagið ikki hevur mett vera strategisk týdningarmikil. Vit mugu meta um, antin tað er rætt at frígera kapital ella sita við ognum. Kapitalur gevur okkum orku til at gera íløgur, og í hesum førinum hava vit mett tað vera eina rætta avgerð at selja, sigur Helge Lund. Sølurnar, sum Statoil hevur staðið fyri seinastu trý árini, eru uppá 90 mia. kr. (Lesið eini greining á oljan.fo í næstum um, hvønn týdning nýggja avtalan kann fáa fyri føroyska oljuleiting.) Kortini visa leiðirnar sum Statoil hevur selt burtur av sinum loyvum og annars visa kortini hvussu nogv loyvi OMV er partur av hinumegin markið. Cambo, Tornado, Tobermory oa.